


# Fullsett Norðurlandahús til Markleysa Útbúgving

21.09.2013 - 09:33

Oljan.fo

Neyvan nakrantíð áður hevur verið so stúvstappað við fólki – og entá ungum lesandi føroyingum – tá skipað varð fyri frálíka tiltakinum “Markleys Útbúgving” nú um dagarnar.

Tað mundi vera eini 800 ung, sum høvdu leitað sær í Norðurlandahúsið henda týsdagin til tiltakið Markleys Útbúgving.

Evnið í ár var «altjóðagerð av útbúgvingum». Holger Arnbjerg bjóðaði vælkomin og nevndi, at hetta var 11. árið á rað, at skipað verður fyri tiltakinum, og øll hesi árini hevur orkufelagið Statoil verður ein av stuðlunum.

Í ár var Rúni M. Hansen, stjóri á Statoil, gestarøðari á ráðstevnuni. Hann hevði eina áhugaverda røðu og tosaði um útbúgving, royndir og persónlig virði yvirhøvur. Hann nevndi millum annað týdningin av at hava rættan hugburð, og eggjaði teimum ungu til at verða ábyrgdarfull og vísa gott arbeiðssemi.

Tað var eisini áhugavert at hoyra, hvussu eitt altjóða felag sum Statoil, sum er størst í Norðurlondum og nummar 34 á listanum hjá Forbes yvir heimsins størstu feløg, hugsar um kappingarførið, og tann týdningin tað menniskjaliga tilfeingið hevur.

Skráin fyri tiltakið var annars fjølbroytt. Millum annað greiddi Sigurð í Jákupsstovu, rektari á Fróðskaparsetrinum, frá um møguleikarnar fyri lestur á Fróðskaparsetrinum, og Niels Winther og Erika Hayfield tosaðu um føroyska arbeiðsmarknaðin.

Eisini luttóku umboð frá øllum hægri útbúgvingum í Føroyum, okkara grannalondum og meira fjarskotnum londum, sum t.d. Póllandi og Avstralia. Í ár var serligur dentur lagdur á skiftislestur.

Á tiltakinum vóru eisini fleiri básir umboðandi ymsar útbúgvingarstovnar, har tey ungu lesandi kundu fáa leiðbeining og kunning. Um kvøldið varð eisini skipað fyri tiltaki.

Myndirnar eru frá tiltakinum.
Myndatøka Jensk K. Vang og Jan Müller/oljan.fo

















